# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Karston Joensen til minnis

Nú gerst tað alt oftari, at andlátini í útvarpinunum fáa meg at rakna við, og týskvøldið fór hjartað aftur at banka, og knappliga gjørdist hesin vakri dagur sorgtungur, og djúphugsanin hevði hug at troðka vælveruna frá náttúrðanum burtur.

Karston Joensen andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi, 68 ára gamal, ljóðaði útvarpsrøddin og so var stríðið liðugt, stríðið móti krabbameini og taparin gjørdist aftur menniskjan. Karston er lík. Liggur við holaðum kinnum gulbleikur í hvítari kistu. Pínan er horvin. Stúranin fyri nær deyðin fór at koma er eisini horvin. Holdið liggur friðsælt í kistu, og sálin er á veg heim.

»Je hevði tvær hendur, hjartað tað slóð og gætan var mítt heim«. Soleiðis plagdi Karston at taka til, tá hann hugdi aftur á teir myrku partarnar av lívinum og teir vóru ikki so fáir.

Karston var drykkjumaður og fyri 25 árum síðan var »gætan« hansara heim. Tað var tá eg hitti hann fyrstu ferð, og tá visti eg einki um, at hann kallaðist Karston. Hann var bara ein navnleysur. Eg búði í einari lítlari kjallaríbúð í Dr. Jacobsensgøtu 5. í Havn. Karston búði onkunstaðni nærhendis, hvar veit eg ikki, hann búði úti onkunstaðni. Svav úti uttan hita av nøkrum slag, søgdu tey og ristu við høvdinum. Eg hitti hann í Keypssamtøkuni dagliga. Eg hugsaði, hvør man hesin gamli maðurin vera. Hann gekk har í einum bláum yvirfrakka við belti um miðjuna. Bláur hevði hann einaferð verið, nú var hann mest blankur av skitti, og serliga blankt var har mest slit var á. So hevði hann langt svart glinsut hár og svartar sólbrillur, sum ongantíð blivu strikaðar, hóast langt kann vera millum sóltímar í Føroyum. Svartur og skitin, forfjónaður og einsamallur og uttan hita av nøkrum slagi. Ein gamal maður á at líta og tó einans 43 ára gamal, tá ið er nú rokni eftir. Og so angaði hann so vælsignað av frískum Aqua Velva barberspritti. Eg kendi deymin av honum langa leið, har hann spakuliga, sveittandi og ristandi flutti seg móti barberspritthillini í Brúksuni í Dr. Jacosensgøtu. Eg hugsaði, eg má ongantíð enda sum hasin maðurin.

Nógv ár seinni siti eg í íbúðini hjá Karston í R.C Effersøesgøtu í Havn. Tað er har ið Danstein gravsteinafyritøkan við útlendskum gravsteinum heldur til. Vit høvdu nú kenst í fleiri ár. Eg endaði



næstan sum hann. Og tá eg kom aftur til lívið, stóð hann á fyrstu røð at taka ímóti mær og hjálpa mær tey fyrstu fetini á nýggju edrúu lívsleiðini. Karston var ikki heimleysur meira, hann búði í hesi lítlu íbúðini og hansara sorgblíða lyndi varð rættuliga sett í rammu í hesi lítlu íbúð við øllum teimum navnleysu gravsteinum uttanfyri. Hann umboðaði gravsteinafyritøkuna í býnum, og hetta var seinasta starv hann hevði, áðrenn hann flutti til heimbygdina tey seinastu árini. Eg visti slett ikki, at Karston var sami maðurin, sum eg hevði eygleitt so mangan við barberspritthillina í brúksuni í Dr. Jacobsensgøtu. Og meðan vit sita og práta, so síggi eg eina lítla mynd av vegginum. Og har er hann aftur, skitni og gamli sprittarin úr Dr. Jacobsensgøtu. Eg spurdi Karston, hvør hasin maðurin var. »Hatta eri je, hatta var je, tá gætan var mítt heim. Je hevði tvær hendur og hjartað tað slóð og gætan var mítt heim«.

Inni í íbúðini var nossligt, og onki var til felags millum Karston og gamla mannin á myndini á vegginum. Teir vóru úr hvør sínum heimi. »Je búði á gøtuni. Onnur vóru í eins svárari neyð sum eg, bara ríkari peningaliga, munurin var bert, at tey høvdu ráð at keypa rennusteinin og flyta hann inn í fínu stovurnar«. Segði Karston.

Og so prátaðu vit víðari um nýggja lívið, meðan navnleysu gravsteinarnir stóðu svangir uttanfyri. Tveir turrlagdir drykkjumenn sita og leggja ætlanir, tosaðu um nakað so fjart frá tí gamla lívinum sum at rinda skuld aftur, vilja svara hvørjum sítt og enda enntá inni á andaligum lutum. Tosa um Gud, og um at taka ábyrgd í livinum.

»Fyrst og fremst so má eg takka tí góða Gudi fyri alt, og at hann læt hetta undrið henda, at eg kundi fáa eitt normalt lív. Eg hevði mist alt og serliga virðingina fyri mær sjálvum, og nú er alt við at rætta seg aftur spakuliga«, segði Karston, og setta drekka á borðið. Karston var húsligur sum fáur. Hann prátaði víðari um Guð, sum sannførd fólk av sonnum vanliga gera. Hann hevði nú eisini funnið andaligan heimstað í eini samkomu og gleddist við lívið.

Søgan um Karston er ein sólskinssøga, sum hevur fløvað og styrkt mangar illa komnar drykkjumenn seinastu 20 árini í Føroyum. Hann var tolin og hjálpsamur og so húðleysa erligur. Hann var ikki bangin at oysa av sínum egnu sváru lívsroyndum fyri at hjálpa øðrum við pínu. Hann var ein fyrimynd, og hann hevði fingið frið við síni medmenniskju, nú hann lat saman eygu.

Karston valdi ungur sjólívið og livdi mong ár í Íslandi, har hann giftist og fekk fleiri børn. Familjan syndraðist av levnaðinum og Karston endaði aftur í Føroyum, her hann livdi í fleiri ár sum bums í høvuðstaðnum. Tá ið hann hevði reist seg aftur, fór hann aftur til skips og sigldi millum annað sum kokkur við størsta íslendska nótabátinum Hólmaborg. Karston var kokkur og enntá ein sera dugnaligur kokkur. Hann sigldi so leingi hann orkaði.

Seinastu árini hevur hann búð á Tvøroyri og heldur ikki her gróv hann talentirnar niður. Hansara arbeiði við fólki í neyð ber longu ávøskt og fræ eru sáað til styrk og uppbygging í komandi tíðum.

Og akkurát nú, meðan eg skrivi hesar reglur kemur Karston ljóslivandi fram fyri meg, hesin lítli nossligi maðurin við kamelinum í slipsinum og við blíða smílinum. Og eg fái ringa samvitsku av, at eg ikki fekk sagt honum farvæl í livandi lívi, og at eg verið staddur uttanlands um Gud vil, meðan lætta kistan verður jarðað seinni í vikuni. Tó somikið av áliti havi eg til ævinleikan, at hesi minningarorð náa honum, uttan mun til, hvussu langt burtur sálin nú er skotin.

Tøkk fyri, mín góði vinur Karston, tú fórt ikki óbrúktur higani og tínar royndir fara at hjálpa okkum í tínum stóra vinarskara, hesin skari, sum tú vígdi títt lív til.

Friður veri við minninum.
Heilsan

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**

## NEKROLOG



Ved meddelelsen om sangeren og billedkunstneren **Ólavur á Vális** død mindes jeg et dejligt menneske, hvis venskab og menneskelige egenskaber fylder meget i erindringen. Vi mødtes i januar 1982 på Kunsthøjskolen i Holbæk. Her lærte vi Ólavur at kende som et varmt og musisk menneske, der ejede humor og beherskede den kvikke replik - og så kunne han synge! For undertegnede, som kom fra den danske kulturkreds' sydlige hjørne, var det en oplevelse at stifte bekendskab med den færøske sangskat.

På højskolen arbejdede Ólavur med skulptur og maleri. Synsoplevelsen var udgangspunktet, som også ses i tegningerne fra de senere år. Et gennemgående træk er billedernes faste struktur.

Sammen med sine søskende indspillede han CD'en "Sterk var tann hond". Den rummer bl.a. "Harri, Tû meg tókst" med melodi af Knud Vad Thomsen, der oprindeligt komponerede den til St. St. Blichers Til Glæden.

*Boer du højt blandt hine Stjerners Hær,*
*Som jeg saae paa Himmelbuen tindre?*
*Har ej Himlen da det samme Skjær?*
*Er dens høje Stjernehvælving mindre?*

Blichers vers passer fint på Ólavur, det åbne, glade og musiske menneske.

**Viggo Böhrnsen-Jensen**
Grafiker og maler
Flensborg

## Dagurin

**25. Februar. Victorinus**, deyður umleið ár 250. Halgisøgurnar eru ymiskar á máli. Summar siga, at hann varð tikin av døgum í Júdea, aðrar í Egyptalandi og uppaftur aðrar í Róm. Sama navnið sum Victor: *sigurharri.*

*Johan Henrik Schrøder varð føddur hendan dagin í 1771.*

## 100 ára føðingardagur



Sunnudagin 27. februar fyllir Karl Jacob Sigvardsen frá Gjógv, búsitandi á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, 100 ár.

Føðingardagurin verður hildin norðuri við Gjógv.

Byrjað verður við kirkjugongd klokkan 12.00.

Klokkan 13.30 bjóðar kommunan øllum, sum ynskja at heilsa upp á Karl Jacob, til døgurða í Gjáar Samkomuhúsi.

Aftan á verður farið til kaffi á Gjáargarði, har øll eru hjartaliga vælkomin. Hildið verður á til klokkan 17.00

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá

**Atli P. Dam**

doyði og varð jarðaður.

*Fyri tey avvarðandi*

**Sólvá**